Platini væl nøgdur við EM

Forsetin í UEFA, Michel Platini, er væl nøgdur við EM-endaspælið í Sveis og Eysturríki, sum endaði í gjárkvøldið. - Eg eri ein glaður forseti. Fyriskipanin av kappingini hevur verið framúr góð, og tær báðar vertstjóðirnar hava samstarva fyrimyndarliga. Spælarar og venjarar hava eisini givið europeiskum fótbólti eitt gott image við hesari kappingini, sigur Platini við heimasíðuna hjá UEFA.

Teir ungu skulu verða heima

U21 landsliðsvenjarin hjá Danmark, Keld Bordinggard, heldur, at ungir danskir spælarar skulu ikki fara til útlandið at spæla fótbólt. Teir skulu heldur hava tol, verða heima í Danmark og menna seg. - Tað ringasta, sum kann hendan fyri ein ungan spælara, er, at hann fer til útlandið, men ikki fær neyðugu spælitíðina til mennast, sigur Bordinggard við BT. Hann heldur, at summir ungir spælarar ongantíð koma fyri seg aftur, eftir at teir hava havt eina miseydnaða tíð uttanlands.

Jóhan Troest Davidsen og Tórður Thomsen eru tveir av ungu runavíkingunum, sum veruliga hava bitið frá sær í Formula-deildini

Mynd: Álvur Haraldsen

NSÍ-B36 3-1 (2-0):

Nú ganga teir ungu undan

NSÌ

B36

Yngru NSÍ spælararnir hava tikið stóra ábyrgd á seg, og eftir sigurin á tannleysa B36 hava meistararnir lyft seg nærri toppinum

FÓTBÓLTUR

Jóannes Hansen
joannes@sosialurin.fo

Tað vóru ikki minst veteranarnir Jens Martin Knudsen og Pól Thorsteinsson, sum taldust millum størstu álitini, tá ið NSÍ í fjør var sannførandi meistari. Hesir báðir eru ikki longur á meistaraliðnum, og tað kann væl vera ein av orsøkunum til, at tað ikki var so sannførandi fleiri tey fyrstu umførini.

Nú gongur betri, og orsøkin er eyðsýnd. Ungu menninir, sum eisini vóru óførir í fjør, megna nú at lyfta stóru ábyrgdina.

Bogi Løkin var tvífaldur málskjútti í 3-1 stevnusigrinum á B36. Umframt við at skjóta tvey mál var Bogi rættuliga eyðsýndur á annan hátt. Hann arbeiddi nógv, flutti seg væl og var skilagóður í avspælinum. Jóhan Troest Davidsen var stinnur miðverji, og sjálvandi telur tað rætta vegin, at hann aftur hesa ferð taldist millum málskjúttarnar.

Øssur Dalbúð hevur vunnið fyrsta rættin til fremstu ódnina. Hann var rættuliga einsamallur, men hann arbeiddi nógv og væl og átti lut í málum, áðrenn hann varð skiftur út.

Ivaleyst valdi venjarin at geva Jónhardi Frederiksberg møguleikan, tá ið B36 flutti fólkið langt fram á vøllin í roynd at koma afturíaftur. Hetta bar nógv pláss við sær aftanfyri B36 verjuna, sum skjótleikin hjá Jónhardi kundi brúkast í.

Mønusting undan steðginum

Serliga fyrra partin av 1. hálvleiki var NSÍ greitt við yvirlutan. Teir høvdu verið fleiri ferðir tætt við, tá ið Bogi Løkin í 18. minutti setti hol á: Hjalgrím Elttør og Einar Hansen spældu seg ígjøgnum í vinstru, Einar legði innfyri, og tað eydnaðist Øssuri Dalbúð við høvdinum at stýra bóltin fyri føturnar á Boga Løkin, sum takkaði fyri, tá ið B36 verjan var lítið avgjørd.

Sum 1. hálvleikur leið fekk B36 betri tak á spælinum. Stóri trupulleikin var, at tað var eingin broddur í heilt har frammi. Hanus Thorleifsson sat skaddur uttanfyri, Potemkin var sendur til hús, og tað tyktist alt ov stórur biti fyri Tamás Nagy uttan serligan stuðul at skula stríðast við og ímóti NSÍ miðverjunum.

Mønustingin fekk B36 í síðstu sekundunum av 1. hálvleiki. Hjalgrím Elttør legði úr vinstru hornasparksinnlegg aftur um handara stólpan. Óli Hansen var blankur, tá ið hann við høvdinum stýrdi bóltin inn fyri málið aftur, og B36 verjan ansaði heldur ikki Jóhan Troest Davidsen, sum mitt fyri málinum takkaði fyri og stýrdi bóltin í málið.

Tómgongd

Í 2. hálvleiki var talan um nógva tómgongd og lítið hugflog. Heðin Askham styrkti tíðliga í 2. hálvleiki um álopspartin við at flyta Santos longri fram í vinstru, meðan Jóhan V. Gunnarsson yvirtók vongverjan í vinstru og Oddmar Færø kom inn á vongverjan í høgru. Santos hevði onkur gjøgnumbrot, men tað var eingin broddur í mitt fyri málinum, har Tórður Thomsen saman við Óla Hansen og Jóhan Troest Davidsen hevði tamarhald á støðuni.

Spenningur kom í aftur, tá ið Magnus Olsen, sum saman við Klæminti Matras stríddist nógv á miðvøllinum, við rimmar skoti úr 18 metrum og umvegis tvørtræið minkaði um munin. B36 royndi at spenna álopsbogan uppaftur meiri, men tað kendist tannleyst, og í yvirtíðini var Bogi Løkin púra kaldur, tá ið hann, eftir stórt B36 kiks í verjuni, setti bóltin framvið Hans Jørgensen.

B36 botnurin sæst

Lagið var einki serligt í B36 leguni eftir stevnutapið í Runavík, og tað var ikki so undarligt. Eftir at tað í fyrsta triðinginum av kappingini hevur gingið heilt væl hjá nýggja liðnum, sum av góðum grundum ikki hevur havt møguleika at samanspæla seg heilt, so hevur tað síðani sjøtil varð settur á annan triðingin av hesum kappingarárinum hilnast illa:

B36 hevur eftir 3-0 heimasigurin á Víkingi bara fingið tvey stig burtur úr trimum dystum – 0-0 á Skála, 1-1 á heimavølli ímóti ÌF og nú tap í Runavík. Higartil hevur B36 spælt fýra ferðir aðra staðni enn í Gundadali, og úrtøkan hevur verið fýra stig: 1-0 sigur í síðstu løtu á Toftum og 0-0 á Skála.

- Hetta mundi vera botnurin var staðfestingin, áðrenn B36 um eina viku skal til Klaksvíkar.

Seks ferðir uttan at tapa

Eftir at tað í fleiri av fyrstu umførunum skinklaði hjá meistarunum í NSÍ, hevur tað seinastu ferðirnar gingið sum eftir ánni. Ikki síðani 18. mai, tá ið NSÍ legði rygg til 3-0 tap í Gundadali ímóti HB, eru meistararnir farnir av vøllinum uttan úrtøku.

Eftir eitt stig ímóti Skála og KÍ hevur NSÍ fýra tær seinastu ferðirnar vunnið fulla úrtøku.

Í vikuskiftinum tóku meistararnir seg nærri toppinum, tí oddaliðið EB/Streymur tapti í Gøtu:

- Vit hugsa um okkara avbjóðingar, og vit taka ein dyst í senn. Men sjálvandi er tað uppaftur hugaligari hjá okkum, tá ið vit vinna, og sigrarnir bera okkum nærri toppinum, siga teir í Runavík.